# Sjúkrarøktin á vegamóti

**Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar bjóðar nú til fjórðu Heilsu- og Sjúkrarøktarráðstevnuna og 15 ára føðingardagshald við eini fjølbroyttari og áhugaverdari skrá**

RÁÐSTEVNA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Fjórða sjúkrarøktarráðstevnan verður í døgunum 10. og 11. oktober í Norðurlandahúsinum. Og samstundis heldur felagið sín 15 ára føðingardag.

Á ráðstevnuni verður støðgað á og gjørt status. Litið verður aftur í tíðina fyri at síggja, hvussu felagið gjøgnum árini hevur verið við í stríðnum at menna vitanargrundarlagið, fakliga samleikan og góðskuna í sjúkrarøktarøkinum.

Samstundis verður ljóskastarin settur á tær avbjóðingarnar og teir møguleikar, sum nútíðin og framtíðin fara at bjóða.

Hendan ráðstevnan verður mett at vera eitt tað besta høvi hjá limum at fáa nýggja vitan og íblástur her heima. Felagið sigur, at tey við stevnuni geva sínum limum eitt íkast til at skapa nýhugsan og menning av sjúkrarøktarfakinum.

Frá felagnum verður sagt, at tey við ráðstevnuni og føðingardagsveitsluni vóna, at limir fáa dagar sum geva "hvíld" frá strævna gerandisdegnum, nýggja orku og íblástur til at fara út aftur við.

Jana H. Dalsgaard er forkvinna í Felagnum Føroyskir sjúkrarøktar-frøðingar, og hon sigur, at tað tó ikki bara limir í teirra felag, sum tørva íblástur í dagliga yrki sínum við stórum og smáum spurningum innan heilsu- og sjúkrarøkt.

– Tí bjóða vit eisini øðrum fakbólkum, arbeiðsgevarum og politikarum vælkomnun við á ráðstevnuna, sigur hon í innbjóðing sínari.



*Dagarnar 10. og 11. oktober verður fjórða Heilsu og Sjúkrarøktarráðstevnan í Norðurlandahúsinum. Forkvinnan í felagnum, Jana H. Dalsgaard bjóðar øllum at verða hjartaliga vælkomnum*

### Fjølbroytt skrá

Ráðstevnan er sum sagt í tveir dagar, og hon býður upp á mangt og hvat. Byrjað verður fríggjadagin 10. oktober við gudstænastu í Dómkirkjuni við Sonju Klein, presti. Síðani verður døgurði á hotel Hafnia.

Síðani verður hildið fram við ráðstevnuni. Jana H. Dalsgaard setur stevnuna, og ráðstevnuleiðari báðar dagarnar verður Bjørt Samuelsen, journalistur.

Gjøgnum dagin verða fleiri fyrilestrar um millum annað kunnleika og menning innan yrkið og nýrák og røkt. Eisini verður nakað av skemti og hugna á skránni hendan dagin, sum endar um fimmtíðina.

Leygardagin byrjar ráðstevnan aftur klokkan níggju. Og tann fyrraparturin fer við fyrilestrum.

Seinnapartin verða fleiri áhugaverd evni á skránni. Millum onnur verður eitt innlegg við einum avvarðandi um, hvat brúkararnir siga og eitt panel við umboðum frá Mentamálaráðnum, Heilsumálaráðnum, Almannaráðnum, Sjúkrarøktarfrøðisskúla Føroya, Landssjúkrahúsinum og Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Eftir ein fyrilestur við Jógvani Fríðriksson, presti, um Etikk og samskifti við einstaka sjúklingin, endar Jana H. Dalsgaard ráðstevnuna, Sjúkrarøktin á vegamóti.

# Fara nú aftur at dansa

**Í Hósvík fer Dansifelagið Fragdin nú aftur undir at dansa**

DANSIFELAGIÐ FRAGDIN

Nú kvøldini gerast myrkari, og kaldari gerst úti, fer Dansifelagið Fragdin í Hósvík, at fjálga um køldu heyst- og vetrarkvøldini.

Dansað hevur verið í Hósvík í fleiri ár, og fyri einum tveimum árum síðani fekk felagið so navn og nevnd.

– Matilda og Tom Nielsen undirvísa í dansi hjá okkum. Tey bæði hava eisini undirvíst tey bæði seinnu árini, sigur nevndarformaðurin.

– Nógv vóru og dansaðu í fjør. Bæði ung og gomul, og tey koma allastaðni frá. Bæði úr Havn, Norðstreymi og úr Eysturoynni

Best er um tey, sum koma, koma í pørum, tí soleiðis skipar dansurin seg betur, tí annars kann tað enda við, at onkur stendur stakur eftir.

Dansað verður av øllum sløgum. Dansispøl, pardansir, valsur, rekkjudansir, kvadriljudansir, polka og allir møguligir aðrir dansir eru á skránni í vetur.

Dansurin er í bygdarhúsinum í Hósvík, og øll eru vælkomin. Byrjað verður aftur sunnukvøldið 28. september klokkan 19. Dansað verður síðani hvørt sunnukvøld frá umleið 19 til 21.

Til ber at tekna seg hjá Ann Christiansen á telefon 422368/264820, Elin Davidsen, tlf. 422291/265844 og Idu Hansen, tlf 422425/213425. Kostnaðurin er 400 krónur parið.



*Aftur í vetur fara hósvíkingar at skipa fyri dansi, og verða tað aftur Matilda og Tom Nielsen, sum fara at standa fyri undirvísingini*

†

Kunngjørt verður, at okkara elskaða mamma, vermamma, omma og langomma

**OLIVIA CARLSSON**
**Tvøroyri**

andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi leygardagin 6. september, 86 ára gomul.

Kistan fer úr kapellinum í kirkjuna mikudagin 10. september kl. 18.00.
Jarðarferðin verður hósdagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Irene, Ben, Onita, Ovin og Ivan**





*Avrikslørn er hørð, men opin og erlig, sigur Bárður Enni, stjóri á Heilsufrøðiligu starvsstovu, sum sjálvur hevur roynt skipanina*
*Mynd: Jens K. Vang*

# Ein eggjandi løn

**Bárður Enni, stjóri á Heilsufrøðiligu starvsstovur, hevur áður virkað undir eini skipan við avriksløn. Skipanin er hørð, viðgongur hann, men hon er eisini mennandi og spennandi. Hon kann setast í verk í Føroyum, men so skal nógv orka setast av, heldur almenni stjórin**

AVRIKSLØN
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Skal tað gerast, so skal tað gerast ordiligt.

Orðini eigur Bárður Enni, stjóri á Heilsufrøðiligu starvsstovu, nú orðaskifti um eina nýggja lønarskipan er í hæddini. Áðrenn Bárður Enni gjørdist stjóri á Heilsufrøðiligu starvsstovu, arbeiddi hann fyri helvt av 90-árunum hjá medisinalfyritøkuni NOVO Nordisk, sum hevur avriksløn fyri øll starvsfólk. Frá ovasta leiðara og heilt niður á gólvið.

– Skipanin var góð. Málini fyri hvørt starvsfólk vóru sett fyri eitt ár í senn, og eg upplivdi tað ógvuliga positivt. Tað var ótrúliga spennandi og eggjandi, at tú vart mettur fyri tíni avrik. Tú setti tær sjálvum mál saman við leiðsluni, og møguleiki var fyri at fáa nógv eyka í løn. Tað var kanska hart, men eisini rættvíst, sigur Bárður Enni.

### Tveir streingir

Skipanin hjá NOVO Nordisk kallast APIS, ið stendur fyri Annual Performance Improvement System. Nøkur mál verða sett fyri hvønn einstakan persón í risastóra felagnum fyri hvørt ár. Tað verður gjørt við eini starvsfólkasamrøðu.

Talan er um tvey sløg av málum: Forrætningsmál og førleikamál. Forrætningsmálini snúgva seg um ítøkilig úrslit, sum skulu náast. Førleikamálini eru bleytari og snúgva seg persónligar eginleikar, førleikar, ábyrgd og annað.

Hjá leiðsluni kundi eitt forrætningsmál vera, at felagið skuldi vinna ávísan part av marknaðinum á einum ávísum øki. Síðan var farið niður ígjøgnum deildirnar og krøv vórðu sett til hvønn einstakan.

Soleiðis kann eitt mál fylgjast gjøgnum skipanina, og avgjørda kravið er, at ein menning alla tíðina skal henda. Fyri at røkka málunum kann vera neyðugt, at leiðslan setir pengar av, so førleikin verður skaptur at røkka málunum.

– Eg fekk eitt forrætningsmál, sum eg ikki hevði førleika til at gjøgnumføra. Eg fekk læring á økinum, so eg kláraði uppgávuna. Sostatt er hetta ein give-and-take skipan, sum er mennandi bæði fyri arbeiðsplássið sum heild og tann einstaka, sigur Bárður Enni.

### Hørð skipan

Skipanin var ikki fyri sartar sálir, viðgongur Bárður Enni.

– Skipanin var hørð, men opin og rættvís. Endamálið við skipanini er, at hon skal føra til framburð. Tey, sum ikki megna málini, sum eru sett, verða sett undir lupp. Tað fingu tey at vita, og avleiðingin kundi vera, at veik lið vóru uppsøgd, sigur Bárður Enni.

Í árligu starvsfólkasamrøðuni varð mett um avrikini síðsta árið og samstundis verður næsta árið sett í kortið.

– Hevði tú gjørt eitt gott avrik í einum ári, kundi tú fáa frá einari upp í fleiri mánaðarlønir eyka. Nøkur skoraðu kassan, men hinvegin merkir tað sjálvandi, at nøkur fingu minni í løn. Um onkur kendi seg órættvíst viðfarnan, so kundu tey fara longur upp í skipanina við málinum, sigur Bárður Enni.

Tað ljóðar sum ein skipan, ið elvir til sjálvdrátt, men Bárður Enni leggur dent á, at fyri at tú skuldi megna ávísar uppgávur, var tað eitt krav, at tú gjørdi nýtslu av øðrum fólkum við ávísum førleika. Sostatt var eisini talan um at uppbyggja samstarvsbólkar fyri at náa málunum, sigur Bárður Enni.

### Orka setast av

Skipanin virkaði væl, heldur stjórin á Heilsufrøðiligu starvsstovu, og hann dugir ikki at síggja, hví tað ikki skal bera til at gera ein føroyska skipan, ið byggir á somu prinsipp. Men tað skal gerast ordiliga.

– Skal ein slík skipan virka, skal nógv orka setast av. Fólk hava 1000 onnur ting av taka sær av, og tí má orka setast av at fyrireika eina skipan við avriksløn. Skal ein slík skipan virka, skal onkur alla tíðina menna hana. Tað er alneyðugt, at menning av tí einstaka er innbygd, og at gjøgnumskygni er í skipanini. Annars er tað ógjørligt, sigur Bárður Enni.

Sambært Bárði Enni skal samlaði lønarsummurin ikki økjast, fyri tað um farið verður til avriksløn. Tað merkir, at skulu nøkur fáa meiri, mugu onnur fáa minni. Tað er eisini neyðugt at gera sær greitt, hvat skal henda teimum, sum ikki megna krøvini. Skulu tey sigast upp?

– Tað kann vera ein avleiðing. Men vit mugu ikki síggja trøll á alljósum degi. Sum starvsfólk kanst tú altíð siga, at tú ikki vilt røkka einum máli. So fært tú bara tað minni í løn. Skipanin skal eisini innihalda møguleikar fyri at skrúva niður fyri blussinum, um serlig viðurskifti gera seg galdandi orskað av børnum, sjúku ella líknandi, sigur Bárður Enni.

## Karsten ivast í avriksløn

**Summi fáa meira og onnur minni í lønarposan fyri sama slag av arbeiði. Spurningurin er, um tað er rímiligt, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður**

AVRIKSLØN
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Orðaskiftið um nýggja almenna lønarskipan er gagnligt, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, men hann sær bæði fyrimunir og vansar fyri sær.

– BLF hevur lagt fram nakrar leysar tankar um avriksløn. Einki ítøkiligt uppskot er komið fram, og tí ber illa til at gera ítøkiligar viðmerkingar. Tó haldi eg, at tað sjálvandi skal loysa seg hjá almennum starvsfólkum at gera góð avrik. Vit eiga at bøta um effektivitetin, og hitt almenna eigur eisini at royna at fáa dugnalig starvsfólk at støðast. Spurningurin er tó, um hetta gerst við avriksløn, sigur Karsten Hansen.

Ein nýggj lønarskipan má vera rættvís og rímilig, og tað ivast hann í, um avrikslønin er.

– Avriksløn ber í sær, at summi fáa meira og onnur minni í lønarposan fyri sama slag av arbeiði. Spurningurin er, um tað er rímiligt, sigur Karsten Hansen.

Aðrir partar av avrikslønini hóva honum heldur ikki serliga væl.

– Tær sonevndu avrikspuljurnar fara helst at økja um almennu lønarútreiðslurnar. Trupult er at máta og at meta um avrikið hjá hinum einstaka, og avriksløn kann als ikki brúkast fyri summar starvsfólkabólkar. Eisini eru nógvir av stovnunum og almennu arbeiðsplássunum í Føroyum smá, og tí kann vera tungt at seta avrikslønarskipanina í verk og umsita hana, sigur Karsten Hansen.

Hinvegin er landsstýrismaðurin sinnaður at kjakast um at endurnýggja lønarskipanina og gera hana meiri individuella. Men tað er ikki løtuverk, sigur hann.